tíðindablaðið
**sosialurin**
Nr. 55 Hósdagur 20. mars 1997 71. árgangur Kr. 7,00

***Patologiska deild lúkar ikki trygdarkrøvini:***

# Sjúkur av at arbeiða á Landssjúkra-húsinum

Síða 4



Yvirlækni hevur fingið varandi sjúku av at arbeiða á Landssjúkrahúsinum. – Patologiska deild er ein av vandamestu støðunum á einum sjúkrahúsi, sigur Bjarne Bech



*Býráðið í Havn á fundi í kvøld:*

## Kristiligt nærvarp á Rás Tórshavn

*Síða 7*

*Uni Vestureið, kriminalkommiserur:*

## Fólk hjálpt væl til at uppklára Lorvíksmál

*Síða 3*



## Føroyingar á Ekofisk

*Síða 16-17*

FLOGFRAKT * SJÓFRAKT
SAFARI TRANSPORT
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tlf. 12222

VØRU-KOYRING
FLYTING
ÚR FØROYUM TIL FØROYA
Goymsla & Flytikassar
TILBOÐ verða givin
Lagaligir prísir!
Pf. HP trading TRANSPORT
Tlf. 17272
Fax 15009

*Elsta og eitt tað størsta olju- og gassfeltið í Norðsjónum - Ekofisk - er einki minni enn ein pengamaskina - fyri norska statin og fyri oljufelagið Phillips. Í samfull 26 ár hevur oljusprænurin staðið upp úr teimum mongu boriholinum á hesum risastóra feltinum. Phillips er farið undir eina útbyggingarætlan fyri 18 milliardir krónur og hevur fingið longt loyvið at framleiða til ár 2026. Tá hevur feltið verið í brúki í nærum 60 ár og kortini verða tá meira enn 60% av oljuni eftir í goymslunum.*



*Ein lítil partur av tí risastóra Ekofisk-komplekstinum*

# Ekofisk - ein býur á sjónum

Jan Muller

Um mánaðarskiftið februar-mars vóru umboð fyri føroyskar fjølmiðlar á eini heldur óvanligari og ikki minst áhugaverdari og spennandi ferð í Norðsjónum - í eini fyri føroyingar flestar heilt nýggjari og ókendari verð, nevniliga umborð á fleiri oljubori- og framleiðslupallum.

Tað var Phillips Petroleum í Noregi og í Bretlandi, sum stóðu fyri hesi ferðini, ið hevði til endamál at kunna føroyskar journalistar um, hvat tað er fyri ein verð, ið kann standa fyri framman hjá føroyingum, nú leitað fer at verða eftir olju og gassi um okkara leiðir - og harnæst at kunna um fyritøkuna Phillips, sum er ein av teimum mongu oljufyritøkunum, sum ætlar at vera við, tá leitingin av álvara byrjar við Føroyar.

Farið varð úr Føroyum við flogfarinum hjá Atlantsflog til Danmarkar og víðari til Stavanger, sum er oljuhøvuðsstaður Noregs. Har hava flestu av stóru oljufeløgunum, sum arbeiða í norska partinum av Norðsjónum, sínar skrivstovur.

Vitjað varð í stóra skrivstovubygninginum hjá Phillips Norway, sum stendur fyri størsta virkseminum hjá móðurfyritøkuni uttan fyri USA.

### Rugland og Vernon

Her tóku teir báðir, Jakob Rugland og Richard Vernon ímóti føroysku fjølmiðlafólkunum, sum vóru Dia Midjord frá Dimmalætting, Helgi Jacobsen frá Útvarpi Føroya, Ólavur Rasmussen og Jógvan Páll Joensen frá Sjónvarpi Føroya og so undirritaða frá Tíðindablaðnum Sosialinum.

Hvørjir eru so hesir báðir Phillipsmenninir? Jakob Rugland er júst farin frá við pensión eftir trúgva tænastu hjá Phillips í Noregi í nærum 30 ár. Hann verður mettur sum ein av teimum tungu dreingjunum, ja „the grand old man" hjá fyritøkuni og hevur verið við heilt frá byrjan, tá Phillips fann risastóra Ekofisk-feltið.

Jakob hevur tó ikki kvett allar brýr til sítt gamla arbeiðspláss. Hann hevur nevniliga fingið álagt uppgávuna at vera umboðsmaður hjá Phillips í Føroyum. Ovasta leiðslan í felagnum, sum hevur sæti í Bartlesville í Oklahoma, hevur mett Jakob Rugland vera rætta mannin at standa á odda fyri nýggja leitingarøkinum við Føroyar.

Annars er tað Phillips í Bretlandi, sum tekur sær av leitingini á øllum Atlantsmótinum og tvs. eisini við



*Blaðmaðurin á Dimmalætting, Dia Midjord til arbeiðis umborð á Ekofisk*

